## Minsta avreiðing í nógv ár

Tøl frá Hagstovu Føroya vísa, at avreidd vórðu sløk 71.600 tons um avreiðingarskipanina frá januar til juli í ár. Hetta er umleið 6.800 tons, ella níggju prosent, minni enn sama tíðarskeið í fjør. Um hugt verður eftir avreiddari nøgd, so er minni avreitt av øllum fiskasløgum, men tað er serliga nøgdin av botnfiski, sum dregur niður. Vit skulu líka aftur til 2001 fyri at finna eitt tíðarskeið, sum royndist slakari, tá talan er um avreidd tons um avreiðingarskipanina. Hóast minkingina upp á níggju prosent í avreiddum tonsum, so er minkingin í virði væl minni. Frá jan-juli varð avreitt fyri 685 milliónir móti 702 milliónir sama tíðarskeið 2006. Ein minking í virði á umleið 2,4 prosent.



## Léttari at gerast íverksetari

Allar nýstovnaðar fyritøkur í Føroyum fáa nú tann sokallaða Íverksetanarpakkan. Hetta er ein mappa við øllum tí, sum ein nýggj fyritøka hevur tørv á. Øll verða floymd við lýsingum dagliga, men tað er ikki fyrr enn ein stendur í støðuni at skulu velja telefelag, lýsingarmiðil, bókhaldara osfr., at ein skal nýta óneyðuga langa tíð og orku uppá tað, skrivar Ganda Sp/F í tíðindaskrivi. Íverksetanarpakkin er fyrst og fremst ein vælkomu-heilsan til nýstovnaðu fyritøkuna, og síðan ein samlaður pakki, har fleiri fyritøkur bjóða seg fram sum veitarar og samstarvsfelagar. Nevnast kunnu bankar, grannskoðarar, bókhaldsvirki, telefeløg, tíðindabløð, fakfeløg og aðrir bólkar.

# Gerhard til reiðar at slíta samgonguna

**Men hann ivast í um tað er nakar stirðil í øðrum tingmonnum til at gera tað sama**

VALSKIPANIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Stendur tað til Gerhard Lognberg, verður samgongan slitin nú í heyst.

Tað staðfestir løgtingsmaðurin úr Sandoy.

Sum Løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin er Gerhard sjálvandi við í samgonguni, men hann er nú so argur inn á sínar samgongufelagar, at hann er rætt og slætt til reiðar at slíta samgonguna í heyst.

Tað er spurningurin um at gera Føroyar til eitt valdømi, sum hevur fingið bikarið hjá sandoyinginum at flóta yvir.

Serliga er tað fallið honum fyri bróstið, at tað er ein løgtingslimur fyri samgonguna, sjálvur løgtingsformaðurin, Edmund Joensen, sum hevur lagt uppskotið fram í sjálvdrátti, uttan at tað er viðgjørt í samgonguni frammanundan.



*- Eg eri til reiðar, men eg ivist í um hinir hava rygg at fylgja mær, sigur Gerhard Lognberg*

Tað er eisini fallið honum fyri bróstið, at fleiri av hansara samgongufeløgum hava alment boðað frá, at teir taka undir við uppskotinum.

Undirtøkan fyri at gera Føroyar til eitt valdømi er so stór í Løgtinginum, at alt bendir á, at uppskotið verður samtykt.

Fyri Gerhard Lognberg hevur hetta so avgerandi týdning, at tað skuldi ikki staðið á hjá honum at slitið samgonguna upp á hetta málið fyri at forða fyri, at tað verður samtykt.

Men hann ivast í um tað hevði verið til nakra nyttu hjá honum at tikið stuðulin til samgonguna aftur.

Tað eru nakrir aðrir limir í samgonguni, sum eisini eru ímóti at gera Føroyar til eitt valdømi.

- Men eg ivist um um tað er so frægur stirðil í teimum, at teir tora at slíta samgonguna sigur hann.

Teir løgtingsmenn í samgonguni, sum Gerhard Lognberg ivast í merginum á, eru Anfinn Kallsberg, Jørgen Niclasen, Jógvan við Keldu,Kjartan Joensen, Marjus Dam, Kristian Magnussen, Vilhelm Johannesen og Sverri Midjord.

Og so er tað sambandsmaðurin, Alfred Olsen, sum tók stuðulin til samgonguna aftur, men sum kortini stuðlar henni. Sambært kanning hjá Sosialinum eru allir hesir ímóti at gera Føroyar til eitt valdømi. Harafturat er tað so Hendrik Old, sum ikki svaraði.

Gerhard Lognberg er ikki bilsin av, at ein Gallup kanning hjá Sosialinum vísir, at meirilutin av Føroya fólki tekur undir við, at Føroyar vera eitt valdømi.

- Sjálvandi er meiriluti fyri tí. Fjøldin av fólki býr jú í miðstaðarøkinum. Vit í útjaðaranum, sum hava størsta tørvin á, at Føroyar eru fleiri valdømi, eru so fá, at vit formáa okkum onki.

- Men tað er akkurát tí, at vit eru so fá og formáa okkum so lítið, at valskipanin tryggjar okkum umboð á Løgtingi.

Gerhard Lognberg staðfestir, at hetta er fólkaræðið, sum tað eigur at vera.

# Hóttir við at taka ræðið av Bjarna Djurholm

**Leggur Landsstýrismaðurin ikki uppskot fyri Løgtingið beinanvegin um at gera undirsjóvartunnil til Sandoy, fer Gerhard Lognberg sjálvur at leggja uppskotið fram**

SANDOYARTUNNIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Gerhard Lognberg er í eini rættiligari tvístøðu.

Sum tað sæst á hinari greinini her á síðuni, er hann til reiðar at slíta samgonguna afturfyri, at Løgtingsformaðurin hevur lagt uppskot fyri Løgtingið um at gera Føroyar til eitt valdømi.

Men er tað nakað, hann eisini hevur lagt stóran dent á, er tað at fáa gongd á arbeiðið at gera undirsjóvartunnil til Sands.

Verður samgongan slitin, er vandi fyri, at stígur kemur í ta ætlanina.

Samstundis vil Sambandsflokkurin hava, at tunnilin verður útsettur til í 2010.

Men tað vil sandoyingurin ikki hoyra talan um.

- Eg haldi meg bara til tað, sum vit í samgonguni hava tosað um alt valskeiðið og tað er, at Sandoyartunnilin skal fyrireikast nú, so at arbeiðið kann byrja næsta ár.w

- Tí *skal* uppskot um undirsjóvartunnilin leggjast fyri Løgtingið so skjótt, sum vit hava fund aftur fyrst í september.

Gerhard Lognberg sigur, at kemur nakað í vegin, so at Bjarni Djurholm ikki leggur uppskotið fram, má onkur annar leggja uppskotið fram.

- Leggur landsstýrismaðurin ikki uppskotið fram, fari eg sjálvur at leggja tað fram, tí tað skal fyri Løgtingið nú, staðfestir hann.

- Dettur tað niðurfyri nú, er tað vandi fyri, at tað ganga fleiri ár, áðrenn tað kemur fram aftur, stúrir hann fyri.

- Og eg vil ikki standa modell til at verða drigin upp á trá í eitt heilt valskeið og tí skal Sandoyartunnilin á dagsskrá nú, sigur hann.